# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 08. november 2013

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Eyðfinn Debes, Martin í Nesi, Niels J. Thomsen og Jóhan Eli Poulsen. Magni Bertholdsen var burturstaddur.
Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – hetta kemur inn sum mál nr. 8.

Fundurin varð settur kl. 10.00.

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá felagnum TIGN.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við limagjaldi á kr. 500,- árliga.

2. **Umsókn um stuðul við keyp av jólakalendarum frá Lions Club Suðuroy.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við keyp av 160 kalendarum.

3. **Umsókn um stuðul til kristiligu sjónvarpsrásina Iktus.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 30.000,-.

4. **Tilboð uppá fyrstuhjálparaskeið v. denti á hjartastartara frá Róland Joensen.**
   Samtykt varð, at Rúni Thomsen tosar við Róland Joensen áðrenn komandi fund fyri at fáa ein fastan prís fyri skeiðið.

5. **Regatta 2014 í Hvalba.**
   Samtykt varð at beina málið í Trivnaðarnevndina.

6. **Stuðulsrenning fyri Susvim.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 5.000,-.

7. **Fyrra viðgerð av uppskoti til broyting av kommunustýrisskipan fyri Hvalbiar Kommunu.**
   Fimm vóru fyri og ein ímóti, at kommunustýrisskipanin fyri Hvalbiar Kommunu verður broytt sambært uppskotinum. Broytingin hevur við sær, at borgarstjórin verður settur í fullan brøk ístaðin fyri hálvan. Harumframt er áseting viðvíkjandi Vega- og havnanevndini komin inn í kommunustýrisskipanina.

8. **Umsókn um marknaumskipanir millum matr. 145a og 145b eins og millum 145a og 131l.**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknunum um marknaumskipan millum omanfyri nevndu matr. nr. í Hvalba.

**9. Fyrsta viðgerð av fíggjarætlan fyri 2014.**

Figgjarætlanin fyri 2014 varð gjøgnumgingin. Útreiðslurnar til rakstur eru mettar til kr. 16.813.000,- og íløgurnar til kr. 2.400.000,-. Samtykt varð, at skattaprosentið framhaldandi skal verða 20,0% og barnafrádrátturin kr. 5.000,- pr. barn. Uppskot varð frammi um at hækka skattaprosentið til 20,5%, men varð ikki samtykt, tá 3 atkvøddu fyri og 3 ímóti.

**10. Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd:**

- Skriv frá Umhvørvisstovuni viðv. spillivatnsætlan og spillivatnsskipan.

**11. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd:**

- Spillivatnsætlan og spillivatnsskipan:
  Málið varð útsett til komandi fund.

**12. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundur lokin kl. 13.45

| | | |
|---|---|---|
| Trúgvi Gudmundarson | Rúni Thomsen | Eyðfinn Debes |
| Martin í Nesi | Niels J. Thomsen | Jóhan Eli Poulsen |